



## EITT GOTT BOÐ

**Stað:** Baresso í SMS.
**Slag:** Heit føroysk mjólk við einum pinni við einari sjokolátapyramidu á. Dyppa pinnin í heitu mjólkina, so sjokulátan bráðnar.
**Prísur:** 32 kr. fyri koppin.
**Konsistensur:** Góð mjólkakensla – men kakaið skilir og verður "grýnut", tá tað kólnar nakað!
**Smakkur:** Góður sjokolátasmakkur – bæði ljósa og myrka sjokolátan.
**Rómin:** Haldførur rómi, sum smeltar ov skjótt. Smakkar av "long life".
**Tænasta:** Skjót og góð.
**Stemningur inni:** Hugnaligt og avslappað. Róligur tónleikur.
**Sum heild:** Lekkur sjokolátasmakkur. Betri um tað ikki bleiv grýnut. Spell við rómanum.
**Stjørnur:** ★★★★☆☆ – fyri heildina.





## BEST Í TEST

**Stað:** Sirkus í Vágsbotni.
**Slag:** Brennandi heit belgisk luksus sjokoláta.
**Prísur:** 30 kr.
**Konsistensur:** Mjúk mjólkakensla.
**Smakkur:** Sera góður, mjúkur og søtur sjokolátasmakkur við góðum eftirsmakki.
**Rómin:** Sproytirómi
**Tænasta:** Skjót og sera góð.
**Stemningur inni:** Heitt og hugnaligt. Stuttligt og orginalt.
**Sum heild:** Besti kakaokoppurin í býnum
**Stjørnur:** ★★★★★★ – so góð sjokoláta, at rómin telur ikki niður

## TUNT OG SØTT

**Stað:** Hvonn í Tórsgøtu.
**Slag:** Pulvurkakao.
**Prísur:** 32 kr. fyri koppin.
**Konsistensur:** Tunt og vatnkent. Nakað kalt.
**Smakkur:** Hampuligur sjokolátasmakkur, søtt.
**Rómin:** Haldførur frá Knorr. Smeltar skjótt.
**Tænasta:** Skjót og góð.
**Stemningur inni:** Friðarligt, góður tónleikur, hugnaligt.
**Sum heild:** Ein miðal kakauppliving. Spell við rómanum og at kakaið er ov vatnkent. Ov dýrt.
**Stjørnur:** ★★☆☆☆☆ – mest fyri tænastuna og hugnan. Eitt sindur fyri smákøkuna eisini.

## AVHALDSKAKAO

**Stað:** Kafé Kaspar á Áarvegnum.
**Slag:** Kakaopulvur.
**Prísur:** 25 kr. fyri glasið.
**Konsistensur:** Tunt og vatnkent. Ov kalt.
**Smakkur:** Lítil sjokolátasmakkur.
**Rómin:** Føroyskur rómi, smeltar skjótt.
**Tænasta:** Skjót og góð.
**Stemningur inni:** Friðarligt, stillur tónleikur, nakað modernað ein gráan kavadag.
**Sum heild:** "Avhaldskakao" var skoðsmálið frá vinkonuni. Góðan ljósabrúnan lit.
**Stjørnur:** ★★☆☆☆☆ – fyri tænastuna og fríska róman.





## MEIRA VANILJA ENN SJOKOLÁTA

**Stað:** Mica í N. Finsensgøtu.
**Slag:** Haldfør kakaoskúmamjólk frá MBM.
**Prísur:** 25 kr. fyri koppin.
**Konsistensur:** Góð mjólkakensla.
**Smakkur:** Søti vanlijusmakkurin í rómanum tekur kakasmakkin.
**Rómin:** Sproytirómi, søtur og smeltar skjótt.
**Tænasta:** Skjót og góð.
**Stemningur inni:** Rokaligt. Gangur, tá fólk ganga eftir gólvinum. Ófriður, tá fólk koma inn av gøtuni at læna vesið.
**Sum heild:** Kundi verið betri, um kakaosmakkurin kom meiri til sín rætt. Tvær jólasmákøkur 1. feb.. ups.
**Stjørnur:** ★★☆☆☆☆ – fyri tænastuna.

## EIN FAVORITTUR

**Stað:** Kaffihúsið undir Bryggjubakka.
**Slag:** Brennandi heit sjokoláta við mjólk.
**Prísur:** 35 kr. fyri glasið.
**Konsistensur:** Mjúk mjólkakensla.
**Smakkur:** Sera góður, kraftigur sjokolátasmakkur.
**Rómin:** Haldførur danskur rómi, sum smeltar ov skjótt.
**Tænasta:** Skjót og góð.
**Stemningur inni:** Heitt og hugnaligt. Friðarligur tónleikur.
**Sum heild:** Næstbesta boðið í kanningini. Rómin var einasta minus.
**Stjørnur:** ★★★★★☆ – bara rómin telur niður.